## DAGSINS MEINING

# Neyðugt trygdararbeiði

Arbeiðið at gera neyðug trygdartiltøk i føroysku tunnlunum verður steðgað fyribils, í hvussu er. Orsøkin er hon, at Landsverkfrøðingurin ikki hevur fingið játtan á uppskotinum til fíggjarlóg at gera tey neyðugu arbeiðini liðug.

Kikarin varð settur á trygdarspurningin í føroysku tunnlunum um seinasta ársskiftið. Tá kom eldur í tann stóra bussin, liðabussin, tey róptu. Óhappið hendi, minnist okkum rætt, beint eftir, at bussurin var komin út úr Leynartunnlinum. Fjølmiðlar settu tá spurnartekin við, hvat var hent, um eldur kom í bussin, meðan hann var í tunnlinum? Myndugleikar megnaðu ikki at svara spurninginum til fulnar, og eisini kom fram eitt ivamál um, hvør hevur ábyrgdina av trygdini í tunnlunum.

Líkamikið, síðani hevur verið arbeitt við spurninginum at skapa betri trygd í tunnlunum, m.a. við neyðtelefonum, sløkkiútgerð o.ø. Tað er sjálvandi at fegnast um, tí nógv ferðsla er í fleiri tunnlum alt samdøgrið, og har ferðsla er, henda óhapp.

Arbeiðið at skapa eitt gott og trygt vegakervi hevur verið rættiliga støðugt, síðani landsvegakervið av álvara varð gjørt í 70- og 80-árunum. Verjur settar upp. Lendið, sum hevur forðað góðum sýni, er tiknar burtur. Vegir eru gjørdir beinir, o.s.fr. Men nú er líkt til, at ein partur av hesum arbeiði verður steðgað, tí tað treingist um fíggjarliga. Harafturat er tørvurin á peningi stórur á nógvum økjum. Men so er spurningurin, hvussu vit raðfesta íløgur og rakstur.

Á samferðsluøkinum eru heilt vist nakrar íløgur, sum kunu bíða eitt ár ella fáa eina lægri játtan næsta fíggjarár. Tað hevur størri týdning at fáa ta neyðugu trygdina í tunnlunum framda í verki enn at gera fleiri íløgur innan samferðsluna. Ein íløga, sum kundi bíða eitt ár, ella fingið minni játtan næsta ár, er ferjuleguætlanin á Syðradali. Sjálvandi skulu kalsoyingar hava eina ferjulegu, men sum er, ber til at koma til og úr oynni bæði morgun og kvøld so at siga hvønn dag alt árið.

Skal útjaðarin mennast, og skulu kalsoyingar hava gott ferðasamband, er neyðugt við eini ferjulegu, men arbeiðið at gera ferjuleguna kann óivað byrja, hóast ikki 15 mió.kr. verða settar av næsta ár.

Sum skilst hevur Vinnumálastýrið mælt til at bíða við ætlanini í Kalsoynni eitt ár ella so, men í hesum føri hevur Fíggjarmálastýrið sett játtanina á aftur uppskotið til fíggjarlóg. So er spurningurin, hvør skal ráðfesta íløgurnar: aðalstýrið, sum hevur málsøki undir sær, ella tað máttmikla Fíggjarmálastýrið?

Í øllum førum hava vit aftur eitt dømi um, at landsstýrið samvirkar ikki serliga væl, og at gjógvin millum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin bara veksur, samstundis sum tað treingist um fíggjar- og búskaparliga!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fíggjarlógin grundað á varnar inntøkumetingar

**Kristina Háfoss**



*Magni Laksáfoss vildi í grein í undanfarnu viku undir heitinum "Fíggjarlógin 2003 - eitt makkverk 1" m.a. verða við, at inntøkumetingarnar í fíggjarlógini 2003 vóru alt ov bjartskygdar. Hetta er ikki rætt. Inntøkumetingarnar eru sera varnar og taka til fullnar atlit til minni búskaparvøkstur komandi árið.*

**Rokna bert við 1,4% í búskaparvøkstri**

Sambært Magna Laksáfoss roknar landsstýrið við einum búskaparvøkstri á 6% komandi ár. Hetta er ikki rætt. Sum niðanfyristandandi tøl vísa, so verður bert roknað við búskaparvøkstri á 1,4% komandi ár (sí talvu I). Hetta er ein sera varlig meting, tí hóast útflutningsvinnan kann fáa minni inntøkur í komandi ári, so skyldast vøksturin í føroyska búskapinum í løtuni fyrst og fremst innanlands virksemi. Hetta sæst m.a. av lønargjaldingunum.

Tað tekur tíð áðrenn virksemið innan eitt nú tænastu- og byggivinnurnar minkar vegna verri tíðir, og kann hetta virksemið ikki væntast at minka munandi longu komandi ár uttan so, at búskapurin við eitt skuldi verið fyri álvarsamum hóttafalli. Hetta er ongin orsøk til at vænta, hóast búskaparvøksturin fer at gerast minni.

Nominelli búskaparvøksturin í ár verður væntandi góð 9% og realvøksturin (tvs. reinsaður fyri prísvøkstur) góð 7% (sí talvu I). Hinvegin væntar landsstýrið bert ein realvøkstur á 1,4% fyri komandi ár og má hetta sigast at vera ein sera varin meting (sí talvu I).

**Grundað á lítlan inntøkuvøkstur**

Verður hugt at væntaða inntøkuvøkstrinum hjá landskassanum komandi ár, so verður í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2003 mett, at inntøkur landskassans íalt nominelt vaksa við 3,3% frá 2002 til 2003 (sí talvu II).

Hetta er inntøkuvøkstur, ið væntandi verður, hóast stórtsæð ongin realbúskaparvøkstur verður. Tí hóast tað skuldi hent at nærum ongin realvøkstur varð í búskapinum, so vaksa inntøkur landsins vegna prís- og lønarvøkstur komandi ár. Flestu lønarsáttmálar fyriliggja fyri komandi ár, og tá um 50% av lønarinntøkunum fara í landskassan umvegis skatt, er ein nominellur vøkstur í skattainntøkum longu tryggjaður - sum sagt, um onki álvarsamt hóttafall rakar búskapin komandi ár.

Almenni lønarvøksturin verður í miðal um 3,5% komandi ár og innan tað privata verður lønarvøksturin væl størri. Inntøkur frá avgjøldum og tolli væntast eisini at vaksa eitt sindur,

*Framhald á síðu 11*

Talva I
F¿royska framlei sluvir i (BT ) 1996-2003

| Mi . | BT | rligur nominellur v¿kstur E | BT 198 pr sum | rligur realv¿kst BT |
|---|---|---|---|---|
| 199 | 578 | 8,8 | 429 | 5,9 |
| 199 | 617 | 6,7 | 446 | 3,8 |
| 199 | 694 | 12,4 | 478 | 7,3 |
| 199 | 740 | 6,7 | 485 | 1,5 |
| 200 | 811 | 9,6 | 507 | 4,5 |
| 200 | 921 | 13,6 | 561 | 10,6 |
| 2002 | 1007 | 9,3% | 601 | 7,1% |
| 2003 | 1041 | 3,4% | 610 | 1,4% |

* Met t¿

Kelda: Landsbankin

Talva II
Innt¿kur landkassans 1997-2003

| Mi . | 199 | 199 | 199 | 200 | 200 | 2002 | 2003 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skattainnt¿kur | 93 | 104 | 123 | 131 | 156 | 168 | 176 |
| Avgj¿ld og tollur | 90 | 98 | 104 | 111 | 114 | 122 | 126 |
| Ymsar innt¿kur | 96 | 14 | 11 | 8 | 9 | 5 | 54 |
| R kisstu ul o.t. | 89 | 92 | 94 | 97 | 99 | 62 | 63 |
| Innt¿kur alt | 284 | 309 | 333 | 348 | 380 | 359 | 371 |
| Nominellur v¿kstur | | 8.9 | 7.9 | 4.5 | 8.9 | -5.3 | 3.3 |

* Mett t¿l

Kelda: FMR

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

*Framhald av síðu 10*

men eisini hesar metingar eru varnar. Ríkisstuðulin verður so at siga óbroyttur.
(sí talvu II)

Leggjast skal afturat, at ætlaði skattalættin ikki er innroknaður í fíggjarlógaruppskotið ella tølini í talvu II. Orsøkin er, at skattalættin ikki verður latin fyrr enn tilsvarandi sparingar eru framdar soleiðis, at skattalættin ikki kemur at ávirka avlop landskassans 2003.

Nevnast skal eisini, at væntað varð, at minkingin í ríkisstuðlinum á 366 mió. kr. í 2002 fór at merkja eina minking í inntøkum landkassans á 7,1% í 2002 - men nýggjasta metingin vísir, at inntøkur landskassans bert minka 5,3% í 2002. Orsøkin er, at hóast ríkisstuðulin minkar, so vaksa aðrar inntøkur enn ríkisstuðulin væntandi við 5,8% í 2002 - hetta hóast fiskivinnan og alivinnan í Føroyum ikki hava havt bestu umstøður í ár.

**Varnar inntøkumetingar**

Samanumtikið kann sigast, at inntøkumetingarnar í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2003 mugu sigast at verða sera varnar. Hetta er eisini alneyðugt nú nógv bendir á, at óvanliga stóri búskaparvøksturin í føroyska búskapinum seinastu árini, fer at gerast væl minni komandi árini.

Δ

# Kristindómur og fordómur

**Jeffrei Henriksen**



Hvat er sannleiki? Er t.d. ævintýrið um nýggja búna keisarans satt? - ja og nei. Boðini, sum tað ævintýrið hevur at bera, eru mangar ferðir sannað. Men hitt man fáur ivast í er ósatt: tað hevur valla nakrantíð veruliga verið nakar kongur, sum var so tápuligur, at hann var lumpaður til at ganga blóðnakin ígjøgnum gøturnar. Ikki um at tala: tað, ið menninir søgdu kongi, hvat teir dugdu at seyma, tað var rímiliga als ikki satt.

Er Bíblian sonn? Tað hevur mangur orðadráttur staðist um.

Bíblian er íblást av Gudi. Men munnu ikki (flest)allir prestar og prædikumenn eisini halda seg hava fingið sín íblástur frá Gudi? - Og tó rúka teir saman í ósemju. Ræðulig kríggj hava staðist av ósemju um, hvussu bíblian skal skiljast. Og hava onnur kríggj verið um okkurt annað, so hava báðir partar við Bíbliuni íðiliga kunnað prógvað hvør í sínum lagi, at teir hava rætt. Tað er eisini við Bíbliuni prógvað, at trælahald er rætt, at svørt hevur Gud skapað til at vera trælir hjá teimum hvítu, og at konufólk skulu bara makka rætt fyri mannfólki. Eg minnist eisini ein mann, sum helt upp á, at jørðin er ikki rund, men fløt, tí einastaðni í Bíbliuni verður nevnt okkurt um "Jordens overflade." - Longu í 15. kapitli í Ápostlasøguni kunnu vit lesa um ósemju um, hvat ið er rættur og hvat ið er skeivur kristindómur.

Tað er ein søguligur veruleiki, at allar tíðir og allastaðni, har ið kristindómurin hevur vunnið fram, hevur hann samtíðis verið ávirkaður av mentanini á staðnum, siðum og fordómum, og so er enn eisini her hjá okkum.

Og tíverri er ógvuliga ilt at skilja millum kristindóm og fordómar.

Hvussu verður tann sanna Bíblian lisin? Tað er mangan tiltikið her á landi at lesa - haldið mær til góðar, at eg taki navnið við - at lesa, "sum fanin lesur Bíbliuna." Tað er at pilka einstøk skriftstøð ella brot burtur úr heildini at nýta til próvførslu, t.d. at rættvísgera egnan fordóm.

Í Balslevs Bíbliusøgum stendur m.a.: "Jób var maður, ið óttaðist Guð. Hann var ógviliga ríkur, og átti sjey synir og tríggjar døtur. Men alt í einum læt Guð nógvar vanlukkur koma yvir hann. ... Jób bar tó alt hetta við toli og segði: »Nakin kom eg í heim, nakin fari eg hiðani; Harrin gav, Harrin tók, lovað veri navn Harrans!« Men Harrin royndi Jób meira enn ... Tað komu nú tríggir vinir Jóbs at ugga hann; men teir talaðu óvinaliga við hann og hildu, at neyð hansara mundi vera ein revsing, sum hann átti at fáa afturfyri onkra illgerð, sum hann hevði gjørt ......"

Var nú eisini tað, ið hesir menninir søgdu, satt, við tað at tað stendur i Bíbliuni, sum er Guds orð? Onkur man halda tað. Ið hvussu er tvey fylgjandi ár hevur í kalendaranum, sum Kirkjuliga heimamissiónin gevur út, verið tikið til tað, ið ein teirra segði: "Tú maður, teg rakar synd tín. Job. 35,8a." (Bókstavurin a eftir nummarið fyri skriftstaðið var tilskilaður 22.7.2000, men burturkoyrdur 11.8.-2001). At hetta, at vanlukkur raka ein ella at illa gongur í hond, skal vera gudanna hevnd ella revsing, tað er kend heiðin áskoðan. Men kristin?

Lærusveinarnir ivaðust ikki frammanundan, men vórðu rættleiddir:

Og lærusveinar hansara spurdu hann og søgdu: »Meistari, hvør hevur syndað, hesin maðurin ella foreldur hansara, so at hann skuldi føðast blindur?« Jesus svaraði: »Hvørki hann hevur syndað ella foreldur hansara .... « (Jóh 9,2-3)

Tá ið onkrum prædikumanni her á landi hevði eydnast at dára einar 300 ungar sálir at taka undir við sær í ógvisligari yvirlýsing móti homoseksualiteti, segði hann seg at halda seg til Jesu orð. Hann var tó ikki førur fyri at vísa á, hvørji hesi Jesu orð vóru.

Tað er Jesus Kristus sjálvur og ikki Móselóg, ið er støðið undir kristindóminum. Tí hevur tað avgerandi týdning, at tey okkara skriftlærdu, ið nú so ógvisliga leggja eftir næstum okkara, greitt vísa á, hvar tað stendur skrivað, ið teir meina við, tá ið teir siga seg halda seg til Jesu orð í síni fordøming av homoseksualiteti.

Tey, ið liggja eftir samkyndum, hava Paulus at halda seg til. Men Paulus var ikki Jesus! Paulus var eitt menniskja, skúlaður i hægstu jødisku mentan, sum í sálarneyð eftir at hava jagstrað tey kristnu skifti til kristindóm. Hansara stórverk var at bera kristindómin út í heiðin lond. Men nevnda søguliga veruleika omanfyri, at allar tíðir og allastaðni, har ið kristindómurin hevur vunnið fram, hevur hann samtíðis verið ávirkaður av mentanini á staðnum, kann heldur ikki Paulus hava verið sloppin undan.

Men hvat sigur so Paulus? Tann presturin, ið vísti til skriftstaðið 1. Kor 6,9 hjá Paulusi, las bíbliuna júst á sama tiltikna hátt, sum fanin lesur hana: "... teir, sum lata seg brúka til ónáttúrligt ólevnað, ella teir, sum fremja slíkt ólevnað" er ein orðing, sum er pilkað burtur úr eini serligari heild.

Jesus sjálvur var tiltikin fyri at eta (og drekka!) saman við syndarum (Matt 11,19 og 7,34); men hetta brævið hjá Paulusi er ein ávaring til nýumvendar veikar heidningasálir: "nú skrivaði eg til tykk-ara, at tit eingi viðurskifti skulu hava við nakran, sum er kallaður bróðir, men er ein horkallur ella gírugur ella avgudadýrkari ella illmælismaður ella drykkjumaður ella ránsmaður, so at tit ikki so mikið sum fáa tykkum at eta saman við einum slíkum. Tí at hvat havi eg við at gera at døma teir, sum uttanfyri eru? Døma ikki tit teir, sum innanfyri eru? Men teir uttanfyri skal Guð døma. Koyrið hin vánda burtur frá tykkum sjálvum!" (1 . Kor 5,11-13).

Og Paulus endar við hinum tiltiknu orðunum: "Alt er mær loyvt; men ikki alt er gagnligt. Alt er mær loyvt, men eg skal ikki lata nakað fáa vald á mær" (1. Kor 6.12).

Hvørjar treytir setir Jesus fyri syndafyrigeving?

Her fylgdu ongar treytir við: »Sonur min, hav tú gott treysti, syndir tínar eru tær fyrigivnar.« (Matt 9,2) Hesi orðini segði Jesus, tó at ørindini til hansara ikki vóru at biðja um syndafyrigeving, men at fáa tann sjúka likamliga grøddan.

Í øðrum føri nevnir Jesus hesa grund fyri syndafyrigeving: "Hennara mongu syndir eru henni fyrigivnar, tí at hon elskaði mikið ....." (Luk 7,47).

Tílíkum fólkum sum henni skulu kristin sambært orðum Paulusar, so sum beint omanfyri nevnt, halda seg burtur frá, so at tey ikki so mikið sum fáa sær at eta saman við einum slíkum! - Men tað var sum sagt til serligar umstøður, ið Paulus skrivaði hetta; og tað man valla vera nakar, ið heldur, at Paulus við hesum skuldi gjørt kærleiksboðið til einkis.

Lóg er lóg, men tað er ikki lógin, ið er treytaleys fyri himmalsins sælu. Henni fáa eisini smáir syndarar lut í: "Haldið ikki, at eg eri komin at avtaka lógina og profetarnar; eg eri ikki komin at avtaka, men at fullføra. Tí at sanniliga sigi eg tykkum: Inntil himmalin og jørðin forganga, skal ikki hin minsti bókstavur ella eitt flindur av lógini strikast, fyrr enn alt er fullgjørt. Hvør tann, sum tí brýtur eitt einasta av hesum minstu boðum og lærir fólk soleiðis, hann skal verða kallaður minstur i himmiríki; men hvør tann, sum heldur tey og lærir tey, hann skal verða kallaður stórur i himmiríki. Tí at eg sigi tykkum, at *um rættvísi tykkara ikki ber av rættvísi teirra skriftlærdu* og fariseraranna, koma tit als ikki inn i himmiríkið." (Matt 5,17-20)

- Løgið, at tey, ið vóru so glað fyri a, ikki hava hildið seg til at tikið b við: "tú mansbarn, teg rakar rættvísi tín" (Job 35,8b)

ES. Síðan hetta varð skrivað fyri einum ári síðan, er rættilig gongd komin á øsingina frá føroyskum skriftlærdum at rættvísgera sínar fordómar við at byggja á Móselóg. Kunnu vit ikki nú eins og ápostlarnir og hinir elstu á sinni taka orðini hjá Pæturi ápostli til eftirtektar: "Hví freista tit tá nú Guð við at leggja eitt ok á nakkan á lærusveinunum, sum hvørki fedrar okkara ella vit orkaðu at bera? Men vit trúgva, at vit verða frelstir við Harrans Jesu náði á sama hátt sum teir.« (Áps. 15,10-11)

# Føroysk list í Esbjerg

**Hesa vikuna hava tríggjar føroyskar listakvinnur framsýning í hølunum hjá Føroyingafelagnum í Esbjerg**

LISTAFRAMSÝNING
*Árni Joensen*

Tað eru ikki tey kendu nøvnini í føroyska listaheiminum, sum sýna síni verk á framsýningini í Esbjerg.

Tey, sum kenna føroyska list, munnu kortini kennast við okkurt navnið. Eitt nú hevur Rúna Hansen, sum er ættað úr Fuglafirði, havt fleiri framsýningar ymsastaðni í Eysturoynni og í Smiðjuni í Lítluvík, eins og hon eisini hevur verið við á Ólavsøkuframsýningini nakrar ferðir. Rúna hevur gingið eitt ár á listaskúlanum í Randers, og síðani hon flutti til Esbjerg, hevur

*Framhald á síðu 20*



*Sanna Rasmussen úr Vestmanna, Lív Eidesgaard úr Oyndarfirði og Rúna Hansen úr Fuglafirði hava listaframsýning í Esbjerg í hesum døgum*